

# VEST MANNA DAGAR 2024

VÆLKOMIN TIL VESTMANNADAGAR 2024:

# GÓÐU VESTMENNINGAR OG VITJANDI



Vit eru ómetiliga spent at bjóða tykkum vælkomin á Vestmannadagar 2024, har vit aftur fara at samlast ein kaldan heystardag og njóta tað besta, ið Vestmanna hevur at bjóða.

Bygdaráðið hevur endurskoðað partar av skránni og hevur snikkað skrá saman, sum samantvinnar fleiri av best eydnaðu tiltøkunum seinastu tíggju árini.

Eins og í fjør hava vit valt at savna Vestmannadagar í økir. Tó so, sum nakað nýtt, verður gamla bedingin karmur um fleiri av okkara høvuðsmentanartiltøkum.

**Í STUTTUM Á VESTMANNADØGUM 2024:**
Hósdagin 5. septembur verða Vestmannadagar 2024 settir. Borgarstjórin bjóðar øllum vælkomin til hugnaliga móttøku uttanfyri Spælhúsið. Her fáa øll høvi at síggja tey nýumvældu hølini. Aftaná móttøkuna og setanina verður ein góður møguleiki at seta hol á mentanartiltøkini við Yrkingakvøld við upplestri og tónleiki, Litrenning ella Pubkviss.

Fríggjadagin 6. septembur fara vit sum vant inn á Fjørð. Á hesum degi varpa vit ljós á okkara vinnuligu aktørar, sum ímynda tað, ið Vestmanna er best kent fyri – innovatión. Virkini bjóða inn og dagurin er á tremur við tiltøk fyri bæði børn, ung og vaksin.

Leygardagin 7. septembur er tann stóri dagurin, har vit sum vanligt, byrja við morgunmati í høllini. Síðani verður ein heilur dagur við tiltøkum og aktivitetum fyri allar aldursbólkar. Aftaná laksagrillling og felagssang enda vit kvøldið við einari ógloymandi konsertskrá á gomlu bedingini.

Við tónleiki, undirhaldi og góðum mati verður hetta ein dagur, sum vit øll kunnu gleða okkum til.

Hetta og mangt annað sæst í skránni. Vit gleða okkum til Vestmannadagar 2024.

**VESTMANNA BYGDARRÁÐ**

# MIKUKVØLDIÐ 4. SEPTEMBER



**18:00** **SILKIENNI**

**SJAVSKAPPING**
*Sjavskapping v. Dia Jacobsen og Jógvan R. Isaksen.*
*Vinningar verða latnir til nr. 1, 2, og 3.*

**19:00** **STAÐIÐ**

**TABLETOP FØROYAR – BORÐSPØL**
*Borðspælsáhugafelagið TableTop Føroyar koma í ungdómshúsið við teirra vælumtókta borðspælskvøldi. Tiltakið er bæði fyri børn, ung og vaksin.*
*Hósdagur 5. septembur*

# HÓSDAGUR 5. SEPTEMBER

**09:30** **DAGSTOVNAØKIÐ**

**BAMSURENNING "ØLL BØRN ERU VINNARAR"**
*Barnabati og dagstovnaøkið í Vestmanna kommunu skipa fyri Bamsurenning fyri børnunum á dagstovnaøkinum. Bamsurenningin varpar ljós á Betri vinir, ið er ein fyribyrgjandi verkætlan ímóti happing.*

**15:00-17:00** **KONGSKJALLARIN**

**GRILL FYRI ØLL**
*Børn og vaksin verða boðin at fáa grillaðar pyslur við øllum tilhoyri. Vestmanna Hornorkestur spælir og Sergio syngur og spælir.*



**18.15 - 18:50 SKÚLAVØLLURIN**

**KROPSLIGUR ORÐADRÁTTUR**
*Ársins fótbóltsbrak millum granna kommunurnar Kvívík og Vestmanna.*

**19:00 - 19:30 SPÆLHÚSIÐ**

**SETANARRØÐA OG HANDAN AV BRÚKSRÆTTINUM TIL SPÆLHÚSIÐ.**
*Vestmannadagar 2024 verða formliga settir. Brúksrætturin av bedingini og nýumvælda "Spælihúsið" verður latin kommununi, Bjørg á Rógvi, borgarstjóri og Mouritz Mohr, stjóri fyri Mest P/F, halda røðu.*

**19.30 - 19.55 GAMLA BEDINGIN**

**RENN Í LITUM**
*Børn, ung og vaksin fáa málingadraktir. Runnið verður frá gomlu smiðjuni, eftir Bakkavegi og heimaftur til gomlu smiðjuna. Litpulvur fer at prýða økið á Vestmannadøgunum!*

**20:00 - 22:00 SPÆLHÚSIÐ**

**YRKINGAKVØLD VIÐ UPPLESTRI OG TÓNLEIKI**
*Rakul í Gerðinum og Hans Jacob Kollslíð skipa fyri tiltakinum. Tey hava boðið fýra valayrkjarum at lesa nakrar av yrkingum sínum upp. Talan er um so ymiskar yrkjarar sum Bein Bergsson, Maluna Poulsen, Róa Patursson og Rannvá H. Glerfoss.*
*Afturat teimum kemur Kári Sverrisson at spæla nøkur av sínum løgum. Øll eru hjartaliga vælkomin!*

**22:00- 00:00 SILKIENNI**

**PUBKVISS**
*Vagnur Streymoy skipar fyri spurnarkapping, møguligt verður at keypa te, kaffi o.a.*

# FRÍGGJADAGUR 6. SEPTEMBER



| | | |
|---|---|---|
| VIRKISDAGUR INNI Á FJØRÐ | | **FJØRÐUKRÓGVIN ER OPIN ALLAN DAGIN**<br>*Í ár eru 20 ár liðin, síðani Fjørukrógvin lat upp. Í hesum sambandi bjóða tey vestmenningum 20% av útvaldum vørum í handlinum og vitjan á Søgusavninum.* |
| 13.00 – 17.30 | Á HANDILIN | **BJÓÐAR KAFFI, KØKU OG OKKURT TIL BØRNINI.** |
| 14:00 | VESTMANNA SKÚLI | **SKRÚÐGONGA**<br>*1. 2. og 3. flokkur ganga sambaskrúðgongu frá skúlanum og inn á Fjørð.* |
| 15.00-17.00 | MIÐNÁM Í VESTMANNA | **BIOGRAFUR FYRI BØRN OG UNG** |
| 16:30 | VESTPACK | **BARNATILTAK**<br>*Frá kl. 16:30: Hoppiborg og Gyklarin Rógvi.* |
| 18:30 – 21:00 | VESTPACK | **LIVANDI TÓNLEIKUR**<br>*Við Janus Trúgvason og Brim*<br>*Vit bjóða til eina hugnaliga løtu fyri bæði vaksin og børn.* |
| 21.00 -22:00 | VESTMANNA CAMPING | **HUGNALØTA**<br>*Við góðum tónum frá Joen Magnus Danielsen og Paula Magnussen. Øll eru hjartaliga vælkomin.* |
| 22:00 - | FAER ISLES DISTILLERY | **OPIÐ HÚS**<br>*Gurðun Sólja og Janus Kampmann koma at syngja og spæla. Møguligt verður at fáa sær okkurt leskiligt afturvið.* |

# LEYGARDAGUR 7. SEPTEMBER




**9:30** **HØLLINI**

**MORGUNMATUR**
*Felags morgunmatur, tónleikur og ársins herðaklapp verður handað.*
*Laila Haldansen forkvinna í mentanarnevndini bjóðar vælkomin, og Bjørg á Rógvi borgarstjóri, avdúkar Ársins herðaklapp.*

**10:00 - 12:00** **SKÚLIN**

**FRAMSÝNING**
*Framsýning við gróti og útstappaðum fuglum í Miðhøllini.*

**10:00** **BÓKASAVNIÐ**

**BÓKASAVNIÐ**
*Vit hava kasserað hópin av bókum. Bøkur um alt millum himmal og jørð, og nú kunnu tit koma at fylla tykkum posan við hesum bókum fyri 20 kr. Minnist til, bert kontant.*

**10:30 - 11:30** **SKÚLAVØLLUR**

**SANDKASSAFÓTBÓLTUR**
*Aftur í ár fer sandkassafótbóltur at verða á skúlavøllinum. Skuldi veðrið ikki verið til vildar, verður fimleikahøllin brúkt.*

**10:30 - 11:30** **SKÚLAVØLLUR**

**TOMBOLA**
*Tombola verður samstundis sum sandkassafótbólturin.*

**12:30 - 14:00** **VIÐARLUND**

**GONGUTÚRUR**
*Gongutúrur niðan í Gjónna við ferðaleiðara, heitur drekkamuður verður at fáa, tá komið verður oman aftur.*



| | | |
|---|---|---|
| 13:00 – 01:45 | GAMLA BEDINGIN | **MATSØLA**<br>*Matsøla verður frá kl. 13:00 til tiltøkini á økinum eru liðug uml. kl. 01:45. Gundur Fossdal hevur mattelt á økinum. Her verður møguleiki at keypa burgarar, wraps/kebab v.m.* |
| 12:30 – 13:00 | GAMLA BEDINGIN | **LJÓÐ- OG LITRÍKUR SÚKLUTÚRUR**<br>*Ljóð- og litríkur súkklutúrur/rennitúrur verður frá gomlu Skipasmiðjuni, eftir Bakkavegi og heimaftur til smiðjuna.* |
| 13:00 – 14:00 | GAMLA BEDINGIN | **BARNATILTAK VIÐ TRØLLAPÆTUR OG OMMUNI**<br>*Barnatiltak byrjar, tá ið súkklurnar og børnini eru komin aftur á økið. Trøllapætur og omman taka ímóti børnunum.* |
| 13:00 – 16:00 | GAMLA BEDINGIN | **MARKNAÐARDAGUR Í TELTINUM**<br>*Tilmelding til søluborð fer fram hjá Anju Haldansen við at senda boð á 522553 ella skriva til hennara á Facebook. GG! Avmarkað pláss.* |
| 14:00 – 16:00 | GAMLA BEDINGIN | **BARNATILTAK VIÐ SKÓTUNUM ÚR KVÍVÍK**<br>*Skótaliðið úr Kvívík skipar m.a. fyri bogaskjóting, sneisa-breyði og seymsláðing fyri børn og ung.* |
| 14:00 | GAMLA BEDINGIN | **MOTORSÚKKLUFRAMSÝNING**<br>*Guli hálvmáni koma at vitja við sínum motorsúkklum.* |

**16:00 - 17:00 Á KAIINI**

**FISKIKAPPING FYRI BØRN**

*Fiskikapping verður fyri børn á kaiini niðan fyri fiskavirkið. Tann, ið fær tyngsta fiskin, vinnur. Vinningar, sum eru gávukort frá Disvoy, verða latnir til nr. 1, 2 og 3 í kappingini. Foreldrini hava ábyrgdina av børnum sínum.*

**16:00 - 18:00 VEKTARBÚÐIN**

**BÓKAFRAMLØGU**

*Í samband við Vestmannadagar verður bókin Tær góvu lív um kvinnur, sum doyðu í barsilssong, løgd fram. Rigmor Restorff Dam, søgufrøðingur, greiðir frá evninum og tilgongdini. Pauli Magnussen og Kirstin Johannesen spæla vakrar tónar áðrenn bókaframløguna.*



**16:00 - 22:00 STAÐIÐ**

**UNGDÓMSHÚSIÐ STAÐIÐ**

*Ungdómshúsið hevur opið fyri børnum og ungum undir 18 ár. Húsið, ungdómshúsið úr Klaksvík, kemur á vitjan. GG! – tað er strangliga bannað at koma í ungdómshúsið ávirkaður.*



**17:00 – 18:15 STAÐIÐ/SILKIENNI**

**KONSERT VIÐ UNGDÓMSBÓLKUM OG ADRENALINE**

*Tónleikaverkstovurnar, ið hava verið á Staðnum seinasta árið, hava skapt nýggjar bólkar í Vestmanna. Askur Durhuus (trummur), Kristian Magni Durhuus (gittar), Bragi í Gerðinum (gittar/bass/sang) og Tórur Jacobsen (gittar/bass/sang) eita knassarnir, ið manna bólkin Hardcase. Teir og Attika koma at hita upp fyri Adrenaline.*

**19:00 – 19:45 GAMLA BEDINGIN**

**GRILLAÐUR LAKSUR, HUGNI OG TÓNLEIKUR VIÐ RÓIN SIGGERTSSON**

*Øll eru vælkomin at royna grillaðan laks frá Hiddenfjord. Brim koma at grilla laks o.a., og Gundur ger sítt vælumtókta eplamorl. Í barrini á økinum verður høvi at keypa sær okkurt at leska sær við. Avmarkað nøgd av laksi.*

*Tiltakið er ókeypis.*



**20:00 – 21:30  GAMLA BEDINGIN**

**SYNG VIÐ – FELAGSANGUR FYRI ØLL**

*Finnur Koba leiðir okkum ígjøgnum eina fjálga sangløtu, har felagssangur fer at fylla økið við tónleikaljómi og samanhaldi. Aftaná felagssangin gleðir hann okkum við sínum egnu og fangandi løgum.*
*Sangheftið kann heintast á heimasíðuni vestmanna.fo.*



**21:30 – 22:15 GAMLA BEDINGIN**

**FØROYSKUR DANSUR**
*Norðstreymoyar Dansifelag við hinum lívliga Janusi í Dímun sum skipara, bjóðar øllum vælkomnum til ein hugnaligan dansiring, har vit fara at tríva í gamlar og gleðiligar vísur. Kom og ver við til eina kvøldarstund í góðum lag og í góðum felagsskapi!*
*Leygarkvøldið 7. september*

**22:15 – 23:15 GAMLA BEDINGIN**

**KONSERT VIÐ BRIM**
*Brim, vælkendi tónleikabólkurin úr Vestmanna, kemur at seta lív í Vestmannadagar við teirra orkufulla og fangandi tónleiki. Við røtrum í Vestmanna, og einum frískum, nútímans ljóði er Brim ein bólkur, ið skapar stemning og fær fólkið upp á beinini.*

**23:30 - 00:30 GAMLA BEDINGIN**

**KONSERT VIÐ ADRENALINE**
*Adrenaline er ein tónleikabólkur úr Føroyum, ið hevur veruliga gjørt vart við seg, seinastu tvey árini, við sínum kraftmikla og energiska ljóði. Bólkurin er kendur fyri sínar lívligu framførslur og tónleik, sum blandar element úr klassiskum rokki, hørðum rokki og punk-poppi.*
*Við tungum gittarriffum, intensum trummuspæli og kraftmiklum sangi er Adrenaline ein sonn orkubumba á føroyska tónleikapallinum.*

**00:45 – 01:45 GAMLA BEDINGIN**

**KONSERT VIÐ EYÐUN OG TERJA**
*Eyðun og Terji seta punktum við einum rimmar endabraki! Við lívligum klassikarum og fangandi løgum fáa teir øll at syngja við, og teir skapa eina heilt serliga løtu. Kom og gerst partur av eini ógloymandi sangløtu, sum við fullari ferð setur punktum fyri Vestmannadøgunum!*

# SUNNUDAGUR 8. SEPTEMBER



**11:00** **KIRKJAN**

**SKAPANARGUDSTÆNASTA**

*Rytmisk skapanargudstænasta við Mariu Summers Nolsøe. Vit leggja dent á skapanarverkið og okkara ábyrgd fyri tí. Sungnir verða kendir sálmar, ið somuleiðis snúgva seg um náttúruna og skapanarverkið. Dugnaligir tónleikarar spæla undir, og barnakórið hjá Rannvá Matras-Olsen syngur fyri til sálmasangin.*

**17:00 - 19:00** **MISSIÓNSHÚSIÐ**

**OPIÐ HÚS**

*Opið hús, kaffi og sangur. Øll eru hjartaliga vælkomin!*